GJALDSTOVAN

# Innihaldsyvirlit


Innihaldsyvirlit 1
Útbjóðingarskriv viðvíkjandi veiting av dátusamskifti til Landsnet 2
Útboðstilfarið 2
Tilboðsfreist og innlatingaradressa 2
Spurningar 2
Tillutanartreyt 2
Meting av tilboðum 3
Framferð í sambandi við meting av tilboðum 3
Fyrivarni/Alternativ tilboð 4
Freist ið tilboð stendur við 4
Krøv til tilboðið 4



GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO

## Útbjóðingarskriv viðvíkjandi veiting av dátusamskifti til Landsnet

Gjaldstovan – KT Landsins (hereftir ”Ordragevari”) heitir við hesum á tykkara fyritøku at geva tilboð uppá omanfyristandandi uppgávu.

Útboðið verður framt sum eitt:

- *Alment útboð sambært rundskrivi nr. 9000 frá 1. juli 2016 um keyp av vørum og tænastum.*

## Útboðstilfarið

Útboðstilfarið er samansett av:

- Hesum útbjóðingarskrivinum
- Kravfesting av dátusamskifti til Landsnet
- Tilboðslista, dagfestur tann 03-07-2018
- Fylgiskjali A – Samnet, dagfest tann 16-05-18
- Fylgiskjali B – Breiðband, dagfest tann 16-05-18
- Fylgiskjali C – Tekning av veiting

## Tilboðsfreist og innlatingaradressa

Tilboð skulu latast inn talgild til deildarstjóran á KT Landsins, Birgir av Steinum, birgir@gjaldstovan.fo.

Freistin at lata tilboð inn er:

***14.09.2018 klokkan 13.00***

Tilboð, ið verða latin inn aftaná hesa freist. verða ikki viðgjørd.

## Spurningar

Spurningar skulu setast á føroyskum og í telduposti til Birgir av Steinum, birgir@gjaldstovan.fo. Spurningar skulu setast í seinasta lagi 31.08 2018, kl. 15. Spurningar verða svaraðir skrivliga og dulnevnt. Svar verða atkomulig fyri allar tilboðsgevarar á Keypsportalinum í seinasta lagi 05.09 2018.

## Tillutanartreyt

Tillutanartreyt er besta lutfall millum prís og góðsku.

Lægsti prísurin stendur í forsíðuni á tilboðslistanum.

## Meting av tilboðum

Tillutanartreytin er besta lutfall millum prís og góðsku við hesum vektaðu undirtillutanartreytum:

1. Kostnaður 75 %
2. Tøknilig loysn 20 %
3. Sjálvgreiðsla 5 %

### Viðv. 1.

Við undirtillutanartreytini 'Kostnaður' skal skiljast tilboðið við tí lægsta tilboðsprísinum.

Í metingini verður dentur lagdur á lægsta prís.

Tillutanartreytin 'Kostnaður' verður mett út frá tilboðunum hjá tilboðsgevaranum, sum skrivað á framsíðuni á tilboðslistanum.

### Viðv. 2.

Mett verður, hvussu væl loysnin livir upp til krøvini hjá Ordragevara. Sum áður nevnt, so metir Ordragevarin, at Samnet er besta loysnin, og tí fær Samnet fleiri stig enn ein site-to-site VPN breiðbandsloysn. Tøkniliga metingin umfatar eisini trygdina í uppsetingini.

### Viðv. 3

Meting av møguleikunum fyri sjálvgreiðslu møguleikum.

## Framferð í sambandi við meting av tilboðum

Tilboðini, sum lúka minstukrøvini, verða mett út frá einum prísmyndli við denti á omanfyristandandi treytir.

Prísurin er tann samlaði tilboðsprísurin, sum skrivað í framsíðuni á tilboðslistanum.

Tann, sum hevur besta prísin, fær fult stigatal, sum er 75 stig, í metingini av prísinum, og hinir tilboðsgevararnir fáa stig í mun til besta prís.

Meting av tøkniligu loysnini verður grundað á, hvussu væl loysnin lýkur krøvini, og tilboðsgevarin kann í mesta lagi fáa 20 stig.

Meting av sjálvgreiðsluni verður grundað á, hvussu væl loysnin nøktar tørvin hjá KTL. Tilboðsgevarin kann í mesta lagi fáa 5 stig.

Tilboðið við flestu stigunum fær tilluta uppgávuna.

## Fyrivarni/Alternativ tilboð
Tilboð við fyrivarni kunnu verða havnað. Tað hevur alstóran týdning, at alternativ tilboð eru greið og kunnu samanberast við Samnet og breiðband.

## Freist ið tilboð stendur við
Tilboð skal standa við í 60 arbeiðsdagar frá, at tilboðsfreistin er farin.

Kunning um avgerð um tillutan ber ikki í sær, at tilboðsgevari er frítikin frá sínum tilboði.

## Krøv til tilboðið
Tilboðið skal latast inn á føroyskum.

Tilboðsgevarin skal lýsa væl, hvussu uppsetingin verður gjørd bæði við orðum og tekningum.

Velur tilboðsgevarin at nýta excel fíluna til tilboðslista, fer henda nýtslan fram við egnari ábyrgd. KTL kann m.a. ikki ábyrgdast fyri møguligum feilútrokningum.

Tilboðið skal lúka krøvini, sum standa í útboðstilfarinum.

Um tilboðið ikki lýkur omanfyristandandi krøv, kann tað í síni heild, verða mett sum ikki at lúka tær treytir, sum standa í útboðstilfarinum.

KTL er ikki bundið at taka av omanfyristandandi tilboði frá tilboðsgevaranum.

Vit gleða okkum at fáa tykkara tilboð.

Vinaliga

Birgir av Steinum
Deildarstjóri - KT Landsins
Gjaldstovan